# Sleptu leyst



*Soleiðis sá út í klubbanum í somu løtu sum sjóvarpsverturin kunngjørdi at Guðrun hevði vunnið kappingina. Spenningurin, sum varð bygdur upp hesa seinastu tíðina, slapp leysur og kenslurnar fingu frígg spæl. tey, sum sita, eru frá vinstru, Omma Guðrun, Jonna, mamman, Gitte, við ørmunum yvir høvd og beint aftanfyri hana, pápin, Ási*

Tað er ikki bara landsliðið í fótbólti sum kann savna føroysku tjóðina. Tað klárar Guðrun Jacobsen av Tvøroyri eisini, og tað so nógv meiri enn nakað annað.

Bæði hjá konum og monnum, ungum og gomlum, hevur Guðrun verið samrøðuevnið nú í fleiri dagar og eitt stutt bil hava allir føroyingar, bæði burturi og heima, gloymt alt um herviliga lungnasjúku og kríggj og sorgarleik í Irak. Tjóðin fekk ein glotta í øllum tú hugtyngjandi, sum fer um heimin í hesum døgum. Guðrun hevur givið okkum eitt fríkorter í døprum tíðum. Fólk hava fingið okkurt positivt at tosa um eina løtu og tað er ikki at forsmáa í hesum døgum.

Síðani Guðrun vann fyrsta umfar í kappingini um at verða Stjørna eitt kvøld, hevur stórur spenningur verið um, hvussu hon fór at standa seg víðari.

Men hesar seinastu dagarnar uppundir finaluna, hava fólk ikki tosað um annað.

Og sjálvt finalukvøldið vóru tað nógv sum brúkti høvi til at gera eitt kvøld burturúr.

Nógva staðni vóru fólk komin saman at hyggja eftir finaluni í Stjerne for en aften í felag. Og eisini í øðrum londum brúktu føroyingar hetta kærkomna høvi at hittast til eitt gott kvøld.

Ikki minst høvdu tey gjørt nógv burturúr í heimbýi hennara, Tvøroyri.

Har vístu bæði klubbin og Suðurbio finaluna á hvør sínum stórskíggja.

Har var stúgvandi fult av fólki og fylgdi við og tað sást á øllum andlitsbrøgdum, at spenningurin var øgiligur.

Hóast full semja var um, at Guðrun var rætti vinnari er tað ómøguligt at rokna út, hvussu hyggjararnir fara at atkvøða, so ongin føldi eg tryggan.

Frammanundan varð mett, at tríggir sangarar lógu til at vinna kappingina: Guðrun Jacobsen var hildin at ligja væl fyri, eisini hjá teimum uttanlands, sum vedda um slíkt. Men Tarek varð mettur at verða hennara fremsti mótstøðumaður. og so var tað hasin har Jacob, sum eisini sang avbera væl og sum á ongan hátt kundi avskrivast.

Tað var fyrst og fremst ímillum hesi trý at mett varð, at kappingin fór at standa.

So tá ið Natasha Crone fór a lesa úrslitini upp, sótu fólk sum undir lestri.

Tað loysnaði eitt sindur, so tað kom róp í, tá ið argasti kappingarneyti, hennara, Tarek, fekk triðjaplássið. Og tá ið so varð kunngjørt, at Jacob hevði vunnið annað plássið, kom rættiligur ófriður á fjøldina, tí nú væntaðu tey flestu, at tað kundi bara verða Guðrun, sum vann.

Men tað var deyðatøgn, tá ið sjónvarpsverturin fór at lesa, hvør hevði vunnið.

Og sjónvarpsverturin hevði ikki meiri enn hálvtalað navnið á Guðruni, mundi takið farið av klubbanum. Fagnaðurin mundi ongan enda fingið, rópan og skrálan og armarnar á lofti, nógv verri enn tá ið TB skorar avgerðandi málið á Sevmýru.

Og Guðrun ikki bara vann. Hon vann sannførandi, tí fon fekk 31%, ella næstan triðingin av øllum atkvøðunum. Tilsamans høvdu næstan 300.000 fólk atkvøtt, so Guðrun fekk yvir 90.000 atkvøður.

Sunnudagin kom heim aftur til Føroya. Tá var móttøka á flogvøllinum og seinni um dagin fór hon á pallin í SMS og báða staðni var stúgvandi fult av fólki.



*Fólk sótu sum undir lestri og onkur beit negl, áðrenn úrslitið varð lisið upp*



*Foreldrini ynskti eisini hvørjum øðrum tillukku við einum ordans klemmi. Rómurin í Klubbanum var størri enn tá ið TB skorar á Sevmýri ímóti VB*



*Ongin var so spent og fegin sum Jonna, omma Guðrun. Her fortelur hon einum ungum manni í klubbanum, hvussu hjartð bangar. Hetta er beint áðrenn úrslitið verður lisið upp*



*Og tá ið Guðrun so sang Promise Me einaferð afturat, var ringt at halda kesnlunum aftur*

# ítróttur

Nr. 68 • týsdagur • 7. apríl 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

# Súni Fríði er fríur fuglur

*- Eg var sjálvur inni hjá Jógvani Gregersen við hesum brævinum, og hann hevur skrivað tað undir, so eg dugi ikki at síggja, at har skal vera nakað sum helst at tosa um, staðfestir Súni Fríði Johannesen*



**Gøtumenn eru ónøgdir um, at FSF hevur leysgivið spæliloyvið hjá Súna Fríða Johannesen, og hava átala bæði aðalskrivara og nevndini hjá FSF. Sjálvur sigur Súni Fríði tó, at gøtumenn sjálvir hava skrivað undir skjal, sum loysir leikaran frá sáttmálanum**

LEIKARASKIFTI

*Jákup Mørk*

Tað er nú nakað síðani, at tað kom fram, at teir í Gøtu ikki vóru heilt nøgdir við, at Súni Fríði Johannesen nú er at síggja í B68-búnanum. Í hvussu so er vilja teir vera við, at skal leikarin framvegis spæla á Toftum, skal GÍ hava pengar afturfyri.

Fótbóltssambandið hevur tó avgreitt spæliloyvið hjá leikarunum til B68, og hetta hevur fingið gøtumenn til at taka óvanliga hart til orðanna.

Í einum sera hvassorðaðum skrivi á heimasíðuni átala teir framferðarháttin hjá aðalskrivaranum, Ísak Mikladal, eins og ein átala eisni verður vend móti nevndini í FSF fyri at henda ikki hevur tikið nakra støðu í málinum, eftir at aðalskrivarin hevur avgreitt tað. Fótbóltssambandinum og aðalskrivara tess. Skrivið, sum eisini er at síggja á heimasíðuni, www.gigotu.fo, framgongur aðra staðni í blaðnum. Í skrivinum stendur ikki, hvør leikarin er, men lítil ivi er um, at talan er um Súna Fríða Johannesen.

## Hava undirskrivað leysgevanina

Hvørki FSF ella Súni Fríði sjálvur eru tó í iva um, at her er alt farið fram eftir reglunum.

Ísak Mikladal, aðalskrivari í FSF, váttar, at tað er hann, sum hevur avgreitt málið, men sigur eisini at hann ikki fær gjørt stórvegis viðmerkingar til málið, tá talan í stóran mun er um innanhýsis skjøl.

- Eg fái bara sagt, at spæliloyvið er avgreitt sambært reglunum, og annars kemur kappingarnevndin saman í dag (mánadagin, blðm), har millum annað fíggjarligu viðurskiftini í hesum sáttmálanum helst verða umrødd.

Er aðalskrivarin fámæltur, var tað hinvegin ein heldur meira opinskaraður Súni Fríði Johannesen, sum vit fingu orðið á mánamorgunin. Í øllum førum eftir hann fekk at vita innihaldið í skrivinum á heimasíðuni.

- Nú helt eg sjálvur, at hatta málið langt síðani var avklárað. Tað helt eg í øllum førum, at bæði eg og GÍ vóru best tænt við, men tá teir soleiðis leggja málið út á heimasíðuna, so síggi eg meg noyddan at svarað, sigur leikarin.

- Málið er sum so rættiliga einfalt. Tað er rætt, at eg ynskti at sleppa úr sáttmálanum, tí eg sá meg ikki hava stundir til at venja fýra-fimm ferðir um vikuna, men tá GÍ ikki vildi ganga hesum á møti, var ikki so nógv, sum eg kundi gera. Eg hevði jú skrivað undir fyri tvey ár.

- Eftirfylgjandi breyt eg so beinið seinasta heyst, men eg hevði alla tíðina samband við GÍ, og eg ætlaði mær so at venja aftur, tá eg fekk skriv frá teimum við postinum. Har gjørdu teir vart við, at teir mettu meg hava brotið sáttmálan, og at teir tí ikki høvdu nakrar skyldur mótvegis mær.

Tað sum síðani hendi, er helst tað týdningarmesta í málinum, og í øllum førum man tað fyrst og fremst vera tað, sum FSF hevur tikið støðu frá.

Súni Fríði greiðir nevnliga frá, at hann sendi GÍ eitt svarskriv, har hann segði seg skilja teirra bræv soleiðis, at sáttmálin var uppsagdur, og at hann í so fall kendi seg vera uttan nakrar skyldur mótvegis GÍ.

- Eg var sjálvur inni hjá Jógvani Gregersen við hesum brævinum, og hann hevur skrivað tað undir, so eg dugi ikki at síggja, at har skal vera nakað sum helst at tosa um, staðfestir hann.

Og tað er lítið at ivast í, at hevur GÍ givið leikarunum eina tilsøgn um, at hann er leysur av sáttmálanum, so hevur felagið lítið at hava krav sítt í. Tá hvørki felag ella leikari hava skyldur mótvegis hvørjum øðrum, kann eingin sáttmáli sigast at vera galdandi, og so er tann reglan ikki serliga nógv longur. Heldur ikki reglan um 10.000 krónurs gjaldið fyri áhugaleikarar kann koma GÍ til fyrimuns her, tí tá skal talan nevnliga vera um áhugaleikarar. Altjóða ásetingarnar siga, at leikari ikki skiftir status til áhugaleikara fyrr enn hálvt ár eftir seinasta sáttmálalok, og tí hevur støðan hjá Súna Fríða verið nett hin sama, sum hon er hjá einum yrkisleikara, hvørs sáttmáli er runnin út.

## Vónbrotin um gongdina

Og at enda leggur Súni Fríði afturat, at hann er ikki sørt keddur um gongdina í málinum.

- At eg vildi gevast í GÍ komst fyrst og fremst av tíðini, sum eg mátti nýta til venjingar, um eg skuldi halda sáttmálan. Tí var eg sjálvandi glaður við, tá sáttmálin soleiðis varð ógyldaður. Og eg vil leggja dent á, at tað einki hevur við málið at gera, at eg eftirfylgjandi eri farin til B68. Tað hendi ikki fyrr enn ein mánað eftir, at sáttmálin varð uppsagdur. Umstøðurnar hjá mær at venja eru eisini broyttar nakað, og treytirnar á Toftum eru eitt sindur lagaligari, so eg síggi ongan trupulleika í hesum.

- Tað harmar meg bara almikið, at málið soleiðis skal verða grýtt út til fjølmiðlarnar, og satt at siga, so eri eg ikki sørt vónbrotin um hetta. Eg helt, at málið var avgreitt í sátt og semju millum meg og GÍ, og við tí, sum eg nú havi sagt, vóni eg, at eitt punktum er sett fyri trætuni, staðfestir Súni Fríði Johannesen at enda.